Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 09.02.2021
Mál nr.: 21/00015
Málsviðgjørt: AJ/TH

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 35 frá 31. mars 2017 um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin) verða gjørdar hesar broytingar:
Nýtsluøki lógarinnar	**1.** Yvirskriftin yvir § 1 verður broytt til: "*Nýtsluøki løgtingslógarinnar*"
§ 1. Stuðul sbrt. hesi lóg verður latin prentaðum tíðindamiðli, loftbornum tíðindamiðli við neyðugum loyvum og skrivaðum tíðindanetmiðli. *Stk. 2.* ...	**2.** § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Stuðul sbrt. hesi løgtingslóg verður latin prentaðum tíðindamiðli, loftbornum tíðindamiðli við neyðugum loyvum og skrivaðum tíðindanetmiðli."
§ 1. ... *Stk. 2.* Einstaki miðilin fær ein árligan miðlastuðul, uttan mun til hvørjum miðlapallum miðilin virkar á, sbr. § 2, stk. 2.	**3.** § 1, stk. 2 verður orða soleiðis: "*Stk. 2.* Einstaki miðilin fær ein miðlastuðul, uttan mun til hvørjum miðlapallum miðilin virkar á, sbr. § 2, stk."
§ 3. ... *Nr. 1.* ... 2) miðilin skal íroknað tann ábyrgdarhavandi redaktørin í minsta lagi	**4.** § 3, stk. 1, nr. 2 verður strikað. Nr. 3 og 4 verða eftir hetta nr. 2 og 3.

tilsamans hava tvey heil redaksjonell ársverk, *Nr. 3-4. ...* *Stk. 2-3. ...*	
§ 3. ... *Stk. 2.* Prentaður tíðindamiðil skal, umframt tær í stk. 1, nr. 1-4 nevndu treytir, í minsta lagi koma út eina ferð um vikuna. *Stk. 3.* Skrivaður tíðindanetmiðil og loftborin tíðindamiðil skal, umframt tær í stk. 1, nr. 1-4 nevndu treytir, dagliga hava ein javnan og dagførdan tíðindastreym.	**5.** § 3, stk. 2 verður orðað soleiðis "*Stk. 2.* Prentaður tíðindamiðil skal, umframt tær í stk. 1, nr. 1-3 nevndu treytir, í minsta lagi koma út eina ferð um vikuna" § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Skrivaður tíðindanetmiðil og loftborin tíðindamiðil skal, umframt tær í stk. 1, nr. 1-3 nevndu treytir, dagliga hava ein javnan og dagførdan tíðindastreym."
§ 4. ... *Stk. 2.* Miðlastuðul verður latin sum ein føst grundupphædd, áljóðandi 40% av árligu játtanini á fíggjarlógini, býtt javnt millum umsøkjararnar. Harumframt verða 60% av árligu játtanini á fíggjarlógini latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki. Samlaði miðlastuðulin kann í mesta lagi vera 40% av skjalprógvaðu lønarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið hjá einum miðli ella miðlasamtaki. *Stk. 3.* Lønarútreiðslur sbrt. stk. 2 verða gjørdar upp við støði í góðkenda roknskapinum hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki undanfarna roknskaparár.	**6.** § 4, stk. 2 og 3 verða orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Miðlastuðul verður latin verkætlanum, sum leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði. *Stk. 3.* Stuðul til verkætlanir verður latin til virksemi, ið verður framt í eitt avmarkað tíðarskeið við einum ítøkiligum endamáli og úrsliti."
	7. Í § 4 verður sum stk. 4 sett: "*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri treytir fyri stuðli."
§ 8. Miðilin skal saman við stuðulsumsóknini til Miðlastuðulsnevndina lata inn góðkendan roknskap fyri skjalprógvaðar útreiðslur sbrt. § 4, stk. 2, sbr. § 4, stk. 3. Miðilin skal harumframt saman við stuðulsumsóknini skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sbrt. §§ 2 og 3 eru loknar. *Stk. 2-4. ...*	**8.** § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Miðilin skal saman við stuðulsumsóknini skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sbrt. §§ 2 og 3 eru loknar."

	9. Í § 8 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 4.* Eftir at verkætlan sambært § 4, stk. 2 er liðug, skal viðkomandi miðil lata Miðlastuðulsnevndini roknskap fyri verkætlanina. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um krøv til roknskapin." Stk. 4 verður eftir hetta stk. 5.
§ 10. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt, sum fremur brot á § 8, stk. 4 ella á reglur, ásettar við heimild í § 9, stk. 2. *Stk. 2.* ...	**10.** § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt, sum fremur brot á § 8, stk. 5 ella á reglur, ásettar við heimild í § 9, stk. 2."